FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Fylgiskjal 3

Ummælisskriv

Fíggjarmálaráðið hevur fingið viðmerkingar frá KT-felagnum, Hagstovu Føroya, Gjaldstovuni, Felagnum Peningastovnar og KT-fyritøkuni Klintra.

Viðmerkingarnar snúgva seg í høvuðsheitinum um 1) útboðið av arbeiðinum, 2) skipan av verkætlanini og 3) um ynski og krøv til, hvussu skipanin virkar saman við skipanum hjá øðrum stovnum og talgildum tænastum.

Fíggjarmálaráðið skal viðmerkja, at sambært TAKS, hevur tað stóran týdning at leggja dent á, at talan er ikki um eina nýggja KT-skipan, men at nútímansgera og framtíðartryggja verandi skipanir hjá TAKS.

TAKS hevur í dag 35 skipanir, sum hava alstóran tørv á dagføringum, og neyðugt er at framtíðartrygga hesar skipanir.

Tær skipanir, sum verða nútímansgjørdar, eru tær skipanir, sum starvsfólkið nýtir at avgreiða, rokna og tryggja rætta skattaumsiting; at tollur, skattur og gjøld verða kravd inn á rættan hátt og til røttu tíð. Talan er sostatt um eina innanhýsis KT-verkætlan hjá TAKS, og móttakarin av skipanini er starvsfólkið. Skipanir, ið eru vendar til vinnu, arbeiðsgevarar og viðskiftafólk, eru ikki við í hesi KT-verkætlan. Eingin skipan uttan fyri TAKS er partur av verkætlanini.

Talan er um kritiskan almennan infrastruktur, og tað hevur tí verið av alstórum týdningi fyri allar fyrireikandi avgerðir, at stýringin og eftirlitið við menningini liggur hjá tí almenna, og at tað almenna eigur skipanina, allar kodur og vitanina um skipanina og mannagongdir.

Tað er vert at viðmerkja, at hesi somu viðurskifti eru orsøkin til, at landið eigur ein ognarlut í Elektron. Tað er virkislogikkurin í KT-skipanini, sum longu er á Elektron, sum verður endurskoðaður, nútímansgjørdur og framtíðartryggjaður. Oman á hetta, verður so gjørt eitt nýtt nýtslumarkamót til starvsfólkini á TAKS. Sambært TAKS verður hetta ein kollvelting í effektiviteti og í brúkaravirkseminum hjá starvsfólkunum. Í stuttum er høvuðsmálið sostatt, at gomlu KT-skipanirnar verða framtíðartryggjaðar, og høvuðsmálbólkurin eru starvsfólkini á TAKS.

Niðanfyri verða viðmerkingar knýttar til svarini hjá hoyringspørtunum.

KT felagið vísir á, at lýsingin av útboðnum er ivasom. Tað er ógreitt, um talan er um eitt útboð, sum er ávegis, ella um ein partur longu er avgreiddur, og hví nakað skal í útboð og annað ikki.

Fíggjarmálaráðið skal viðmerkja, at arbeiðið er útboðið. TAKS hevði útboð av menningini av sonevnda front-end í OutSystems-tøknini í 2021.

Tað vóru bert nakrir fáir veitarar, sum vístu áhuga. Onkur veitari helt seg aftur at bjóða, tí teir mettu, at OutSystems ikki var rætta valið. Til hetta skal viðmerkjast, at OutSystems er sama tøkni sum Talgildu Føroyar brúka, og at TAKS hevði fyrireikað hetta valið gjølla. Tað var øllum veitarum greitt frá byrjan, at talan varð um eina langa og drúgva verkætlan, og at avmarkaða upphæddin, sum í 2021 varð sett av til menning, við tíðini fór at økjast, eins og vavið á verkætlanini.

KT-felagið heldur tað vera ein óhepnan útboðsháttt, at starvsfólk hjá KT-fyritøkum verða innveitt í almennar stovnar sum eitt tilfeingi, heldur enn at stovnurin keypir eina tænastu.

Fíggjarmálaráðið metir, at valdi leisturin er tann rætti. Talan er, sum nevnt, um kritiskan almennan infrastruktur, og tað hevur tí alstóran týdning, at stýringin og eftirlitið við menningini liggur hjá tí almenna, og at tað almenna eigur skipanina, allar kodur og vitanina um skipanina og mannagongdir.

Verkætlanin er ein innanhýsis KT-verkætlan hjá TAKS, og móttakarin av skipanini er starvsfólkið.

Tað er umráðandi at mennararnir eru staðsettir hjá TAKS, og tað hevur avgerandi týdning, at hesi arbeiða tætt at teimum starvsfólkum, sum kenna mannagongdirnar. Nevnast kann, at innanhýsis tímanýtslan er eins nógv og tað, sum keypt verður frá veitara.

Valdi leisturin ger mannagongdirnar tryggari og smidligari. Tær ósemjur, sum altíð vilja taka seg upp í slíkum verkætlanum, bæði um fakligar spurningar og val av tøkni, kann leiðslan á TAKS skjótari og betri taka støðu til, uttan at neyðugt er at tingast av nýggjum ella gera avtalu við veitaran.

Valdi arbeiðsháttturin er tann sonevnt agili og er samanberiligur við tann arbeiðsháttt, sum TAKS hevur nýtt í tætta samstarvinum við Elektron í góð 40 ár. Umráðandi er, at varðveita tað, sum royndirnar vísa virkar, bæði fyri at halda játtan og tíðarætlan, umframt fyri at varðveita stýring, vitan og innanhýsis eftirlit á stovninum.

Tað er ikki ein møguleiki at seta nógvar mennarar í starv, bæði tí hesir ikki eru tøkir, og tí tað verður ikki mett at geva besta úrslitið. Vinnan er boðin við gjøgnum tað útboð, sum er framt.

Hagstovan vísir á, at menning av skipanunum hjá TAKS má taka hædd fyri hagtalsendamálinum, og tí hevur tað alstóran týdning, at Hagstovan sum evsti hagtalsmyndugleiki er partur í kravfesting til menning og nútímansgerð av umsitingarligu skipanunum hjá TAKS.

Fíggjarmálaráðið skal viðmerkja, at tað er umráðandi at varðveita og avmarka vavið á verkætlanini til tað, sum í dag er lagt út í kortið. Tað er ikki partur av verkætlanini at fáa nýggjar dátur til vega, sum ikki longu eru í skipanini. Sambært TAKS fær Hagstovan í dag tey data, sum stovnurin biður um, og TAKS fer sjálvandi, har tað er møguligt, at betra um góðskuna og taka atlit at tørvinum á almennum hagtølum sambært teimum krøvum, sum Hagstovan virkar eftir. Neyðugt er ikki at broyta tann leist, sum verkætlanin verður skipað eftir, fyri at røkka hesum máli. Tað kann gerast í samstarvi millum stovnarnar, eins og í dag.

Gjaldstovan vísir á, at fleiri viðurskifti í skipanunum millum stovnarnar virka ikki optimalt í dag, og tað sæst ikki, at samfelagið í síni heild verður tikið við í verkætlanina. KT-verkætlanin er eitt høvi, sum átti at verið nýtt til at hugsa fleiri viðurskifti av nýggjum.

Fíggjarmálaráðið metir, at tað er umráðandi, at hildið verður fast við, at talan ikki er um eina nýggja KT-skipan, men at nútímansgera verandi nógvu KT-skipanir hjá TAKS. Skal endamálið við verkætlanini røkkast, er neyðugt, at onnur viðurskifti, sum ikki eru partar av verkætlanini, ikki verða knýtt uppí. Talan er um eina innanhýsis KT-verkætlan hjá TAKS, og eingin skipan uttan fyri TAKS er partur av verkætlanini.

Gjaldstovan ger vart við, at BSL bókhaldsskipanin ikki virkar optimalt í dag, m.a. vegna avbjóðingar í markamótinum við TAKS.

Sambært TAKS er tað ein liður í verkætlanini at taka støðu til, um verandi bókhaldsskipan skal varðveitast, ella um nýggj skipan skal keypast ella mennast. Gjaldstovan verður tikin við í viðgerðina, tá komið verður hartil.

Gjaldstovan ynskir at gerast ein formaliseraður partur av bygnaðinum í verkætlanini, so tryggjað verður, at sonevndu koblingpunktini, sum Gjaldstovan hevur, verða tikin við frá byrjan.

Fíggjarmálaráðið tekur undir, at hesi viðurskifti verða tikin við frá byrjan. Sum TAKS vísir á, verða aðrir stovnar tiknir við í arbeiðið, tá tað er viðkomandi, og tá komið verður hartil. Opið er fyri nýggjum hugskotum, og øll, sum bjóða seg fram, verða boðin inn og kunnu geva sítt íkast. Neyðugt er ikki at skipa verkætlanina øðrvísi av hesi orsøk. Talan er um eina innanhýsis KT-verkætlan hjá TAKS, og umráðandi er, at TAKS fær stýrt verkætlanini á ein slíkan hátt, at vavið á verkætlanini ikki verður størri enn tað, sum er fyrireikað.

Onnur ynski og atlit kunnu takast við, tá tað er viðkomandi, og er talan um størri broytingar og tillagingar, mugu hesar gerast sum serstakar verkætlanir, tá tíð og tilfeingi er tøkt. Fíggjarmálaráðið metir, at tað er sera umráðandi, at vavið á verkætlanini verður avmarkað til at nútímansgera og framtíðartryggja verandi skipanir hjá TAKS.

Fíggjarmálaráðið metir, at tað er týdningarmikið, at sjónarmiðini hjá Gjaldstovuni verða tikin við, og ráðið fer at brúka Gjaldstovuna sum partur í tí eigarabólki, sum ráðið varðar av.

Felagið Peningastovnar vísir, eins og Gjaldstovan, á týdningin av at atlit at markamót verða tikin við í verkætlanina.

TAKS upplýsir, at verandi markamót sum útgangsstøði verða varðveitt, og at neyðug atlit verða tikin til at nútímansgera og framtíðartryggja hesi. Víst verður til svarið til Gjaldstovuna.

Felagið Peningastovnar viðmerkir, at peningastovnarnir hava uppsagt avtaluna um lønaravrokning, og skiftisavtala skal gerast um Lønarportalin fram til 1. januar 2030, tá hesin verður lokaður. Einki verður nevnt í lógaruppskotinum um menning av nýggjari sjálvavgreiðslu til lønargjaldingar.

Fíggjarmálaráðið skal gera vart við, at lønaravrokningin er ikki partur av hesi verkætlan. Lønaravrokningin verður ein serskild verkætlan, sum farið verður undir, tá henda verkætlanin er komin undir land. Farið verður ætlandi undir fyrireikandi arbeiði til nýggju lønaravrokningina um góð tvey ár í tøttum samstarvi við peningastovnarnar.

Klintra ger vart við, at fyritøkan harmast um útboðsleistin og vísir á vansar og váðar.

Fíggjarmálaráðið metir, at valdi leisturin er tann rætti. Atlit eru serliga tikin til, at talan er um kritiskan almennan infrastruktur, og tað hevur tí verið av alstórum týdningi fyri allar fyrireikandi avgerðir, at stýringin og eftirlitið við menningini liggur hjá tí almenna.

Tað er virkislogikkurin í KT-skipanini, sum longu er á Elektron, sum verður endurskoðaður, nútímansgjørdur og framtíðartryggjaður. Sambært TAKS hevur tað stóran týdning at gagnnýta og varðveita ta alneyðuga vitan, sum serliga Elektron hevur til virksemissøkið hjá stovninum.

Umráðandi er, at ognarviðurskiftini liggja hjá TAKS, eisini so til ber at skifta veitara, um tað er ein fyrimunur og við atliti at veitaratrygd.

Um útboð og javnbjóðis kapping verður víst til svarið til KT-felagið.

Klintra vísir á, at einki verður upplýst um kostnaðin av at reka skipanirnar, ella hvussu raksturin skal tryggjast við førleikum og víðarimennning.

Fíggjarmálaráðið skal viðmerkja, at sambært TAKS broytast rakstrarútreiðslurnar til KT-skipanina ikki munandi og verða, eins og higartil, hildin sum vanlig rakstrarútreiðsla hjá TAKS. Tí hevur ikki verið mett neyðugt at upplýsa serskilt um hetta.

Klintra vísir á, at ongin lýsing er av skipanini.

Sum nevnt, varð avgjørt ikki at kravfesta frammanundan, men at arbeiða eftir sonevnda agila leistinum. Talan er ikki um eina nýggja KT-skipan, har byrjað verður frá nýggjum, men um at nútímansgera og framtíðartryggja verandi skipanir.

Valdi leisturin verður mettur at verða tann best egnaði til hesa verkætlan, bæði við atliti at avmarkaða vavið á verkætlanini og møguleikanum fyri nýhugsan og innovatión.